# Normek vaks sum fuglurin føniks

*Á básinum hjá maskinverkstaðnum, Normek og donsku fyritøkuni, Sawo, á altjóða fiskivinnu-og aliframsýningini, North Atlantic Fish Fair. Danski umboðsmaðurin er til vinstru á myndini og Johnny K. Nón til høgru*



**Johnny K. Nón sigur, at lastbilarnir eru vorðnir ein nógv størri partur av virkseminum hjá Normek, síðan felagið fekk nýggju høllina og fór at umboða Hiab-kranarnar og skiftilast-skipanir.
- Men framvegis eru maskinumvælingarna r umborð á skipum og bátum okkara størsti partur av virkseminum, sigur hann**

MASKINVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*

Maskinverkstaðurin, Normek í Norðragøtu, var við á altjóða fiskivinnu-og aliframsýningini, North Atlantic Fish Fair, sum var á havnalagnum í Saltangará um mánaðarskiftið, apríl/mai.

Í 1997 keyptu Johnny K. Nón og Robert Langgård maskinverkstaðin frá Føroya Banka. Teir eiga hvør síni 50% av fyritøkuni, sum rættiliga hevur fótað sær millum aðrar.

- Virksemið øktist skjótt, eftir at vit høvdu keypt smiðjuna, og skjótt var plásstrot. Vit keyptu tí eina høll, sum stóð í Keypmannahavn. Fýra mans fóru til Danmarkar at taka høllina niður. Hon varð síðan sett uppaftur við síðuna av gamla verkstaðnum. Nýggja høllin er 500 fermetrar stór; tann gamla er 300 fermetrar, sigur Johnny.

### Skip og lastbilar

Fyritøkan, sum hevur 23 fólk á lønarlista, tekur sær serliga av maskinumvælingum umborð á skipum og bátum og umvælingum av lastbilum, persónbilum, umframt plátu-og sveisiarbeiði.

- Vit framleiða eisini dregg fyri Vónina. Dregg-ini, sum viga 1-2 tons, verða nýtt til fortoyningar av aliringum og øðrum í samband við aling, sigur Johnny.

Vónin selir nevniliga lidnar fortoyningsskipanir og aðra útgerð til alivinnuna.

- Umframt egna framleiðslu, umvælingar og nýinstaleringar, umboða vit eisini teir vælumtóktu Hiab-kranarnar og grabbarar. Vit umboða eisini skiftilast-skipaninar hjá Multilift til lastbilar.

Maskinverkstaðurin í Gøtu hevur hesi umboð gjøgnum donsku fyritøkuna, Sawo, sum var saman við Normek á básinum á Fish Fair.

- Vit hava havt hetta samstarv við Sawo í góð tvey ár, sigur Johnny.

### Gøtuskipini

- Vit hava arbeitt nógv umborð á gøtuskipunum og øðrum skipum, síðan vit fóru undir virksemið í 1997. Vit hava serliga lagt okkum eftir at veita skipunum eina tænastu, har menn hjá maskinverkstaðnum eru tøkir, tá ið umvælingar og ábøtur skulu gerast.

Johnny K. Nón sigur, at lastbilarnir eru vorðnir ein nógv størri partur av virkseminum hjá Normek, síðan felagið fekk nýggju høllina og fór at umboða Hiab-kranarnar og skiftilast-skipaninar.

- Men framvegis eru maskinumvælingarnar umborð á skipum og bátum okkara størsti partur av virkseminum, sigur hann.

# Vit eiga ikki at gera sum kinverjar

**- Tað skapar misálit, um vit gera sum kinverjar, tá ið herviliga Sars-sjúkan varð staðfest. Tað loysir seg betur at vera opin og erligur um ILA heldur enn at tiga um hesa fiskasjúku, sigur alari**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Meiningarnar eru ymiskar, og menn eru ikki samdir.

Í Sosialinum í gjár, helt ein alari, Sosialurin tosaði við, at nógva umrøðan, sum ILA-sjúkan hevur fingið í fjølmiðlunum, skaðar áhugamálini hjá føroyskum alarum uttanlands.

Alarin segði, at tá ið føroysku bløðini skriva um ILA, enda hesar søgur í Noregi, haðani tær fara út til okkara keyparar runt um í heiminum.

- Hetta gongur út yvir tann prís, vit fáa fyri laksin og skaðar okkara umdømi, segði alarin.

### Ikki samdur

Men tað eru ikki allir alarar, sum eru samdir um hetta.

- Eg haldi, at vit skulu spæla við opnum kortum og siga sum er, tí á tann hátt varðveita vit sum best okkara trúvirði.

Alarin vísir á misálitið, sum umheimurin fekk á Kina, tá ið kinverjar royndu at krógva álvarsomu sjúkuna, Sars.

- Einasta gongda leiðin í slíkari støðu er at vera opin og erligur, sigur hann.

### Sjúkur fiskur

Alarin reisir eisini spurningin, hvussu ein keypari hevði mett støðuna, um hann umvegis fekk at vita, at føroyskur laksur er fongdur við ILA.

- Tað hevði elvt til misálit. Tí er best, at vit siga sum er og ikki krógva ILA-sjúkuna burtur fyri umheiminum, leggur hann aftrat.



*- Vit eiga ikki at dylja, at ein partur av tí laksi, vit selja av landinum, er fongdur við ILA, sigur alari, ið ikki er samdur við alaran, Sosialurin tosaði við í gjár.*

*Mynd: Tilvildarlig*





*Jesus og Makedonarin varð framført fyrstu ferð í Føroyum á sumri í 2000. Verkið varð gjørt í sambandi við túsund ára haldið fyri kristnanini av Føroyum. Myndin er frá framførsluni í Føroyum*

*Savnsmynd: Jens Kr. Vang*

# Jesus og Makedonarin fær góð ummæli í Danmark

**Klassiska verkið hjá Paula í Sandagerði varð í síðstu viku framført fyri túsund áhoyrarum í Vejle. Ummælarar rósa verkinum, sum Sigmund Poulsen hevur gjørt orðini til, til skýggja, og tað hevur givið Paula blóð á tonna**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

– Tað gekk ómetaliga væl, og eg eri sera væl nøgdur við framførsluna, sigur Pauli í Sandagerði, sum síðani hevur fingið nógvar fyrispurningar um at føra verkið aðrastaðni í Danmark.

Tann 13. mai var Musikteatrið í Vejle karmur um føroyska verkið Jesus og Makedonarin, sum Pauli í Sandagerði hevur gjørt tónleik til, og Sigmund Poulsen hevur gjørt tann upprunaliga føroyska tekstin.

Dagin eftir framførsluna hevði Erik Andresen eitt ummæli í Vejle Amts Folkeblad. Hann gevur framførsluni sera gott ummæli og rósar verkinum fyri vøkur løg og tann serstaka endan. Kristeligt Dagblad hevur eisini ummælt konsertina.

### Stjórnaði sjálvur

Pauli í Sandagerði stjórnaði sjálvur symfoniorkestrinum hetta kvøldið, og hann var væl nøgdur.

– Tað er stuttligt at arbeiða við professionellum tónleikarum, sum liva av at spæla tónleik. Eg var spentur uppá, hvussu teir fóru at taka ímóti mær, tí vit høvdu ikki góða tíð at venja, men teir lótu væl at. Tað hevur verið sum ein dreymur at arbeiða við so góðum tónleikarum, sigur Pauli í telefonini úr Danmark.

Hann sigur, at verkið er rættiliga fjølbroytt tónleikaliga, og tí er tað umráðandi, at tónleikararnir duga at spæla ymsar sjangrur.

– Verkið er ein blandingur av klassiskum, rock, jazz, kórsangi og balladum alt í einum peruvellingi, men eg haldi, at skiftini millum hesar ymsu tónleikagreinirnar gekk bara væl, sigur Pauli.

Tað var Sønderjyllands Symfoniorkester, sum spældi, og solistarnir vóru frá Den Kongelige Opera og Den Jyske Opera. Nevnast skal eisini, at føroyingurin Ernst Sondum Dalsgaard hevði leiklutin sum Jesus.

Húsið var so at siga fult, og nærum 1000 fólk vóru í salinum. Hesum hevði Pauli ikki roknað við, og tað er hann sjálvsagt glaður um. Hetta hevur eisini við sær, at tiltakið hongur saman fíggjarliga. Vandi er altíð fyri einum fíggjarligum smeiti, tá slík stór tiltøk skulu fyriskipast.



*Pauli í Sandagerði, við blómum í hondini, hevur skrivað tónleikin til Jesus og Makedonarin, og verkið fær góð ummæli, nú tað er framført í Danmark*

*Savnsmynd: Jens Kr. Vang*

### Blóð á tonna

Pauli í Sandagerði sigur, at eftir framførsluna hevur hann fingið óteljandi fyrispurningar um at stjórna kórum og orkestrum ymsastaðni í Danmark.

– Hetta hevur veruliga givið mær blóð á tonna, og eg havi hug at seta hetta upp aðrastaðni í Danmark, sigur Pauli, men hann leggur afturat, at hetta er léttari sagt enn gjørt. Tey flestu orkestrini hava nóg mikið at gera, og tey kunnu velja og vraka sum teimum lystir.

– Eg havi fingið nógv tilboð ymsastaðni frá til alt millum himmal og jørð, men tað er avmarkað, hvat eg kann siga ja til, tí eg havi mítt dagliga starv sum lærari.

Hann er eisini serstakliga glaður um tað rós, ið framførslan hevur fingið frá ummælarum. Hann vísir á, at teir flestu ummælararnir leggja vertin á, hvør tú ert, og meta verkið út frá góðsku.

### Áhugabólkur tók stig til tiltakið

Pauli í Sandagerði arbeiðir dagliga sum fólkaskúlalærari í Vejle, og hann greiðir frá, at tað var ein áhugabólkur, sum gjørdi hetta tiltakið møguligt.

– Sóknarpresturin í sókn-ini hevði hoyrt um verkið, og hann bað meg koma í sóknarhúsið at greiða frá verkinum og vísa nøkur dømi. Síðani tóku nøkur fólk seg saman og fóru at savna pening inn, so at verkið kundi framførast í Danmark, sigur hann.

Bólkurin tók sær av at savna pening inn, meðan Pauli tók sær av tí tónleikaliga. Hann setti seg í samband við tónleikarar og fekk ein málkønan at umseta tekstin hjá Sigmundi Poulsen til danskt.

# Listakalendarin útkomin

ÚTGÁVA
*Stefan í Skorini*

Listafelagið hevur givið út Listakalendaran 2004. Tólv av okkara fremstu myndlistafólkum hava gjørt hvør sína mynd til teir ymsu mánaðirnar í árinum, og stutt frágreiðing er á føroyskum, enskum og donskum um tey ymsu myndlistafólkini.

Listakalendararnir frá 2002 og 2003 vóru væl umtóktir og eru útseldir. Listafelagið sigur, at føroysk myndlist er ein góður umboðsmaður fyri Føroyar, og at hesin kalendarin er teirra háttur at sýna fram og breiða út vitan um føroyska myndlist.

Kalendarin er at fáa í sølubúðum kring landið fyri 148 krónur.

# Pop Top konsert leygardagin

*Pop Top konsertin gevur ungum tónleikarum at royna seg á palli. Konsertin verður leygardagin í Grasagarði í Havn*



**Tann árliga Pop Top konsertin verður nú leygardagin í Grasagarði í Havn, har fimm nýggir bólkar fara at royna seg. Vinnarin skal spæla á Ólavsøkukonsertin i í ár**

TÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Hetta er fimtanda árið á rað, at Pop Top konsertin verður hildin, og hon hevur hesi árini givið ungum tónleikarum eitt tiltrongt høvi at spæla á palli.

Leygardagin klokkan 16 fara tónleikararnir at spæla. Luttakandi bólkarnir í ár eru Monkey Mongolia, Tjógv, Paradox , Lam og Atom.

Ein vinnari skal eisini finnast á konsertini, og hepni vinnarin sleppur at spæla á Ólavsøkukonsertini. Áhoyrararnir kunnu at atkvøða fyri sínum favoritti og harvið ávirka úrslitið av kappingini. Harumframt eru tríggir dómarar, sum velja tríggjar teir bestu bólkarnar. Fremsti bólkurin hjá dómarunum fær síðani 100 atkvøður afturat teimum frá áskoðarunum, meðan nummar tvey fær 60 atkvøður og nummar trý fær 30 atkvøður.

Tórshavnar Musikskúli skipar fyri konsertini í samstarvi við Mjólkarvirki Búnaðarmanna.